umhvørvisstovan

P/F LUNA

POSTBOX 29
515 GØTA

Argir hin 27. september 2022
Málsnr.: 22/00752-12
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**Góðkenning av umhvørvisárinsmeting**

Umhvørvisstovan góðkennir hervið, sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini, umhvørvisárinsmeting fyri sólorkuverk á tekjuni á landstøðini hjá P/F Luna í Miðvági.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisárinsmetingini er at tryggja, at ávirkanin av verkætlanini á náttúru, umhvørvi og onnur viðurskifti eru væl lýst, so at sleppast skal undan óvæntaðum avleiðingum av verkætlanini.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

P/F Luna sendi hin 30. juni 2022 Umhvørvisstovuni umhvørvisárinsmeting fyri sólorkuverk í Miðvági.

### 2.1 Verkætlanarlýsingin

P/F Luna hevur lagt 528 sókyknur á takið á landstøð felagsins í Miðvági. Samlaða víddin av sólkyknunum er uml. 1.000 m2, og verður væntaða elframleiðslan uml. 120.000 kWt um árið. Sambært árinsmetingini fer nýtslan av tungolju hjá SEV at minka við uml. 26 tonsum um árið og útlátið av $CO_2$ við uml. 82 tonsum um árið.

Yvirflatan á sólpanelunum eru viðgjørd fyri at minka um endurskinið frá sólkyknunum.



Mynd 1. Sólkyknur á takinum á landstøðini í Miðvági

## 2.2 Umhvørvisárinsmetingin

Sólorkuskipanir kunnu hava ávirkan á náttúru og umhvørvi. Serliga kann talan vera um árin á landslagið og tað lívfrøðiliga margfeldið, har sólorkustøðir eru. Stórar sólorkustøðir tørva nógv lendi, og kunnu tí skaða náttúruna við tað, at tey taka búøki hjá plantum og djórum umframt at skemma landslagið.

Av tí, at sólkyknurnar eru lagdar á takið á einum verandi virkisbygningi, er einki inntriv gjørt á náttúruna og landslagið.

Endururskin av ljósi frá sólkyknum kann vera til skaða fyri fugl. Vatnfuglur kann halda, at tær skyggjandi sólkyknurnar eru vatn, og kann vandi tí vera fyri samanbresti við sólkyknurnar, og at fuglurin fær skaða og ella doyr av hesum.

Kanningar benda tó á, at vandin fyri at fuglur stoytir saman við sólorkuverk er lítil. Yvirflatan á sólkyknunum er viðgjørd fyri at minka endurskin, og minkar tað um vandan fyri samanstoyti.

Endurskin frá sólkyknunum kann eisini vera til ampa fyri fólk, serliga í bústaðarøkjum. Eisini kann endurskin vera til ampa fyri ferðslu á vegum, á flogvøllum og á innflúgvingarleiðum til flogvøllir.

Útrokningarnar í árinsmetingini vísa, at sannlíkindi fyri ampum av endurskini í bústaðarøkjum og vegum er lítil. Eisini vísa útrokningarnar, at endurskin ikki er til ampa fyri innflúgving til flogvøllin í Vágum. Sólkyknurnar síggjast ikki úr torninum á flogvøllinum, og er tí eingin vandi fyri ampum av endurskini har.

## 2.3 Hoyring

Umhvørvisárinsmetingin varð lýst á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni 25. juli 2022. Freistin at koma við viðmerkingum var 24. august 2022. Umhvørvisstovan fekk ongar viðmerkingar.

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

Uppskot til góðkenning varð send P/F Luna og Vága kommunu til viðmerkingar hin 1. september 2022. Freistin at koma við viðmerkingum var 21. september 2022. Hvørki P/F Luna ella Vága kommuna høvdu viðmerkingar.

## 3. Avgerð

Umhvørvisstovan góðkennir umhvørvisárinsmetingina hjá P/F Luna við hesum treytum:

- P/F Luna skal regluliga skráseta skaddan ella deyðan fugl inni á økinum, og á hvørjum ári senda Umhvørvisstovuni eina uppgerð av skrásetingunum og møguliga frágreiðing.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um neyðugt er við øðrum góðkenning sambært aðrari lóggávu.

## 4. Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytir í hesi góðkenning verða hildnar.

## 5. Kæra

Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendir kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 26. oktober 2022.

Suni Petersen, málsviðgeri /

Katrin Haraldsdóttir Jensen, deildarleiðari